## Tey ungu skylda pengar



Tey seinastu árini er tað vorðið altsamt lættari at læna pengar ella at keypa upp á borg, og nú vísa hagtøl í Danmark, at nógv ung hava ilt við at gjalda tað, sum tey hava lænt ella keypt. Fyritøkan RKI, sum skrásetir vánaligar gjaldarar í Danmark, sigur, at tey hava skrásett næstan 6.000 ungfólk millum 18 og 20 ár, tí tey megna ikki at gjalda tað, sum tey skylda. Hagtølini vísa eisini, at talið á ungfólki, sum hava trupulleikar við skuld, veksur í hvørjum.

## Budam fimm av fimm stjørnum

Nú hava íslendskir ummælarar varnast tað, sum føroyskir og danskir ummælarar longu hava skriva í eina tíð, at Budam er ómetaliga dugnaligur. Herfyri spældi føroyski søgusigarin konsert í Reykjavík, og sambært ummælaranum hjá Morgunblaðnum, kundi konsertin neyvan verið betur. Budam fær fimm av fimm møguligum stjørnum, og skoðsmálið er m.a. »Budam fór raunar í gegnum allt litróf tilfinninganna – sorg, ást, losti, ótti, og gleði áttu sér öll stað á þessum frábæru tónleikum sem munu vafalaust seint hverfa viðstöddum úr minni«

# Bíða eftir serfrøðingi

**Ein danskur serfrøðingur var í Føroyum fríggjadagin og kannaði møguleikarnar fyri, at fáa oljuna upp úr Olshanu. Nú verður bíðað eftir hansara frágreiðing**

UMHVØRVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Ein danskur serfrøðingur hevur verið í Føroyum og kannað, hvussu oljan á frægasta hátt kann fáast úr Olshanu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í síðstu viku bjóðaði J&K Petersen sær at tyrva Olshanu, sum liggur á 80 metra dýpi við Flesjarnar.

Hugskotið aftanfyri er, at teir í løtuni flyta tilfar av Kollafirði og søkkja tað í dýpinum millum Stong og Eystnes, og í tí sambandi hava J&K Petersen bjóðað sær til at tyrva Olshanu.

Men á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni verður sagt, at tað í løtuni ikki er aktuelt við tí møguleikanum.

Bárður Enni, stjóri, sigur, at hann í løtuni ikki dugir at síggja, hvussu ein slík tyrving kann forða fyri, at olja lekur úr skipinum. Tí hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan boðað J&K Petersen frá, at tað í løtuni ikki verður arbeitt við tí møguleikanum.

Hinvegin hevur ein danskur serfrøðingur verið í Føroyum og kannað, hvussu oljan kann takast upp av Olshanu. Og í løtuni bíðar Heilsufrøðiliga Starvsstovan eftir einari frágreiðing frá danska serfrøðinginum.

### Støðan greið

Umhvørvið er ábyrgdin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum vegna Innlendismálaráðið hevur økið undir hond.

Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sigur, at teirra støða alla tíðina var greið. Teir mæltu til at fáa oljuna úr skipinum beinanvegin, men Bárður Enni vísir á, at tað var MRCC, sum stóð á odda fyri bjarginging, og teirra støða var líka greið, at tað var fyrst og fremst mannalív, ið stóðu ovast á breddanum.

Nú verður altso bíðað eftir frágreiðingini frá danska serfrøðinginum um, hvussu oljan á frægasta hátt kann fáast úr russiska skipinum.

Men sambært Bárði Enni er í løtuni ikki aktuelt at tyrva Olshanu, eisini tí, at tað er ilt at síggja, hvussu ein slík tyrving kann steðga oljuni at syvja úr russiska trolaranum.

# Marjun Bæk í uppskoti

**Av bispaskrivstovuni verður sagt, at seinasta freist at stilla inn til bisp er 10. september, ella um snøgga viku**

BISPAVAL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Um eina viku er greitt, hvørji lata seg stilla upp til komandi bispavalið. Av bispaskrivstovuni verður sagt, at seinasta freist at stilla upp er komandi mánadag, 10. september.

Annars eru tey ógvuliga sparin við upplýsingum, tó at váttað verður, at uppskot eru komin inn. Men einki verður sagt um, hvussu mong uppskotini eru í tali.

Sambært upplýsingum, sum Sosialurin hevur fingið frá vælvitandi keldum, skal talan verða um fimm uppskot til komandi bisp í Føroyum. Tey, sum uppstillað eru, umfata Jákup Reinert Hansen, Jógvan Fríðrikson, Berg Debes Joensen, Una Næs og Marjun Bæk.

Hetta merkir í stuttum, at komandi bispur væl kann gerast ein kvinna.



*Marjun Bæk er í uppskoti til komandi bisp. Hetta váttar hon sjálv fyri Sosialinum*